## VIÐMERKINGAR

# Árvakið eyga á fólkating

**Rúna Sivertsen**
*www.runa.fo*

Ein serstakliga týðandi partur av arbeiðnum hjá føroysku fólkatingslimunum er at hjálpa einstaklingum, sum av eini ella aðrari orsøk eru endaði í eini blindgøtu. Tað kunnu verða trupulleikar av ymiskum slag, eitt nú í samband við lestur ella uppihaldsloyvi. Fólktingsumboðini hava status, sum ger at tey kunna lata hurðar upp, sum annars eru ógjørligar at koma ígjøgnum. Tí hevur tað stóran týdning, at tú velur eitt umboð í fólkatingið, sum tú veitst fer at leggja orku í og megnar hesa uppgávu.

Vit mugu hava eitt árvakið eyga við tí, sum hendir í danska lógararbeiðnum! Tað, sum fólkatingið samtykkir, hevur oftast stóra ávirkan á føroysk viðurskifti. Tá hava fólkatingsumboðini møguleikan at gera sína ávirkan galdandi við at upplýsa um okkara siðir og mentan.



VAL05

Hóast samráðingarnar um ríkisfelagsskapin ganga millum Føroya Landsstýri og donsku stjórnina, so hava fólkatingsumboðini kortini góðan møguleika at gera sína ávirkan galdandi. Tað forstáilsi, sum skal til, um gott úrslit skal spyrjast burturúr, kunnu fólkatingsumboðini verða við til at skapa.

Vel fólkaflokkin, og tú kanst líta á, at Føroyar fáa eina umboðan á fólkatingi, sum við síni ávirkan vil fremja semjur og úrslit, heldur enn stríð og darv.

# Sjúrður,"arbeiðið" og lønin

**Jóhan Samuelsen**

Nógv undrunarvert verður slongt út í samband við eitt val. Men Sjúrður Skaale, skrivarin hjá Høgna og Tobba á fólkatingi seinastu árini, hann ber nú prísin í Sosialinum leygardagin – maðurin hevur altíð verið frekur, tað vita vit, men at fara at skjóta øllum øðrum fólkatingsvalevnum í skógvarnar, at tey hugsa bara um at fáa fólkatingslønina og einki annað, og so eru tað bara hann, sum arbeiðir á fólkatingi, tað er nógv fyri at hoyra! – Tí veruleikin er hesin:

Allir føroyskir fólkatingslimir higartil, Lisbeth, Jóannes,Óli, o.s.fr., hava fingið teirra fólkatingsløn, ferðastuðul og gjald fyri skrivara. Hesa løn og henda rættin hava øll fólkatingsumboð á danatingi. Men so hava tingbólkarnir hjá ymsu flokkunum eisini ein bólkastuðul, og hesin er ætlaður at nýta í samband við fólkatingsarbeiðið hjá donsku flokkunum á fólkatingi. Ein bólkur á fólkatingi telur altíð í minsta lagi 4 tinglimir, sambært tingskipanini, fyri í heila tikið at kunna kalla seg ein bólk, og harvið hava rætt til henda stuðul.

Men tá Høgni Hoydal kom niður á Danating fyri góðum trimum árum síðani, tá sá hann, við hjálp frá Sjúrði, ein møguleika fyri at fáa so nógvar ferðir vanligu fólkatingslønina uppá 50.000, kr., um Høgni onkursvegna fekk stáplað ein bólk upp á beinini á fólkatingi, so lá leiðin opin fyri beinleiðis at "skovla" pengar inn – og sjálvur skuldi Sjúrður vera spinndoktari og blaðstjóri aftur fyri fyri 37.000, kr um mánaðin. At tað so vóru danskar skattakrónur frá vaskikonum á Vesturbrúgv, sum tjóðveldisfólk so speirekandi og niðrandi siga um danska stuðulin til Føroyar, tað nervaði ikki samvitskuna hjá hvørki Høgna, Tobba ella Sjúrði – moralurin: vit oddamenn "fullveldsins" kunnu taka ímóti donskum krónum, men tær eru skaðiligar fyri allar aðrar føroyingar!?. Einaferð tosaðu garparnir um at almannakunngera, hvat pengarnir skuldi brúkast til – stuttligt at frætt, hvat teir hava gjørt við pengarnar? Hevur nakar hoyrt nakað? Og so kundu teir brúkast í "fullveldisstríðnum" – ella rætt og slætt privat !! Grønlendsku umboðini á fólkatingi tóku av tilboðnum hjá Høgna, men enn vóru teir bara tríggir í tali, og teir løgdu seg á knøini fyri at fáa Libeth L. Petersen við í bólkin, tí so var sloppið upp um markið. Men gakk.



Hon segði neitakk. So nú stóð á gomlum nøglum, eitt fólkatingsumboð restaði í. Men dønum so líkt, tey eru lagalig fólk, so gjørdi fólkatingið eitt undantak frá regluni, um minst fýra umboð fyri at hava ein fólkatingsbólk á tingi, (hóast hesin hevði sum endamál at seta loysingina á dagsskránna!), og sloppið var. Eitt satt gullnám stóð sonevnda "Norðuratlantsbólkinum" í boði.

Tølini eru hesi:

- Lønin pr. mann í bólkinum er 59.000,- kr um mánaðin
- Skrivarin, Sjúrður Skaale, 37.000, kr. um mðr.
- Fjarleikaviðbót 8.000, kr um mðr.
- Høgni Hoydal 37.000, kr um mðr.
- ÍALT 141.000, kr. UM MÀNAÐIN

Hesi tøl siga væl alt hví Høgni, Tobbi og Sjúrður gera alt, sum stendur í teirra makt fyri at sleppa niður aftur á fólkating 8. feb. Og omaná alt hetta hevur Høgni løgtingsmannalønina. Tað eru pengarnir sum draga, sjálvsagt – hetta er jú meiri enn flestu føroysku familjur skulu liva av UM ÁRIÐ!

Ei undur í, at Høgni og Tobbi hava grivið stríðsøksina til eftir valið – pengamaskinan á fólkatingi, Norðuratlantsbólkurin kallaður, má fyri alt í verðini ikki gleppa teimum av hondum – her má arbeiðast í felag bæði hjá Høgna, Tobba og Sjúrði fyri at varðveita henda válgarsbitan, og so má Høgni tola at verða nevndur lítli Messias, manipolator, heimsins stórsti lygnari og annað av somu skuffu, tí eyðsýniliga telja pengarnir meiri enn grovastu æru-meiðingar!! Hetta er ein óverdug, ómoralsk og ófør-oysk pengaavpressing hjá okkum føroyingum at skula liva við – og so kalla teir hetta fyri frælsisstríð! Rætta orðið er kraddari!

At føroyingar hava mist nógvan "goodwill" á Christiansborg, vegna hesa ódámligu framferð og válkan í stuðli til politiskar fókatingsbólkar, sum eru skaptir, við tí eina fyri eyga at vinna sær persónligan pening í lumman, tað er tíverri ein óreingiligur veruleiki – hetta er so einasta úrslitið av "arbeiðinum" hjá Sjúrði higartil! Og hvør hevði væntað, at Høgni, Tobbi og Sjúrður skuldi enda sum offur fyri donskum pengum á fólkatingi? Og fyri at skorið hetta út í papp, so skuldi Sjúrður í staðin fyri lítið sigandi stabbamynd, um hvussu nógv óviðkomandi "mál" og fyrispurningar hann og Høgni hava reist á fólkatingi, sett eina stabbamynd, sum vísti munin á fólkatingslønini hjá Lisbeth og henni hjá Høgna + alt hitt svansið frá Norðuratlantsbólkinum í milliónaklassanum árliga – so høvdu føroyingar verunliga sæð, hvør dugur best at súgva donsku boppurnar!!

Føroyingar, veljið virðilig umboð á fólkating.

# Føroyskir ungdómar á danskar sendistovur

**Vitan er hornasteinurin í nútíðar kappingarføri. Vit eiga at nýta okkara samstarv við Danmark til at fáa ungar føroyingar í starvsvenjing á donskum sendistovum úti í heimi. Á henda hátt fáa vit ungdóm, sum kann hjálpa føroyskum vinnulívi at kappast á útlendskum marknaðum.**



VAL05

**Bjørn Kalsø**

Í samstarvi við danir, sum hava sendistovur í hópin av londum, fer Sambandsflokkurin at arbeiða fyri at fáa ungar føroyingar í starvsvenjing á donskum sendistovum úti í heimi og á henda hátt uppbyggja ein førleika, sum bæði vinnulív og tað almenna kunnu nýta gott av.

Soleiðis kunnu vit gera tað lættari hjá núverandi og nýggjum útflutningsvinnum at fáa ráðgeving. Ung fólk við arbeiðsroyndum frá sendistovum kunnu eisini veita vinnulívinum vitan um útflutningsmarknaðir, vit ikki áður hava troytt.

Neyðugt verður frameftir við fleiri fólkum við serkunnleika til at røkja tær uppgávur, sum fylgja við, tá vit fáa størri uttanríkispolitiskan leiklut.

Hesum fara vit í Sambandsflokkinum at arbeiða fyri.

# Ríkisfelagsskapurin má røkjast

**Atli Hansen**
*Valevni hjá Sambandsflokkinum*



VAL05

Um ríkisfelagsskapurin skal geva okkum tey úrslit, vit ynskja, mugu vit halda hann viðlíka. Eisini her er samstarv vegurin fram — eitt samstarv og samskifti við hinar flokkarnar á fólkatingi. Hetta hava undanfarin umboð fyri Sambandsflokkin víst í verki.

Aðrir flokkar senda umboð í fólkatingi fyri at forkoma ríkisfelagsskapinum uttan nakran tanka fyri, hvar okkara fólk so skal søkja sær ókeypis útbúgving, fáa sjúkraviðgerð ella bara sum ríkisborgari festa búgv og fáa sær arbeiði á jøvnum føti við danir.

Sambandsfólk kenna týdningin av einum vælvirkandi ríkisfelagsskapi og standa tí saman um aftur á hesum vali at senda álítandi umboð á fólkating.

Men hetta krevur, at vit fara á val — og tað mannsterk - og seta krossin við Sambandsflokkin.

Gott val fyri einum ríkum felagsskapi.

Lesið Sosialin - so eru tit við